

*West Phoenix, sum borar fyri ENI og fimm onnur oljufeløg á føroyska landgrunninum.*

# Møguliga rakt við gass á land-grunninum

**ANALYSA** Keldur vilja vera við, at ENI hevur rakt við gass í føroysku undirgrundini. Sagt verður tó einki um hvørki nøgdir ella góðsku.

Jan Müller

Sohvørt borurin á Anne Marie leiðini á føroyska landgrunninum grevur seg longur og longur niður í undirgrundina økist spenningurin – ikki minst tí vónirnar til eitt fund hava verið rímuliga høgar undan boringini.

Leysasøgurnar, sum ganga í løtuni, eru nógvar. Hvørjar av hesum søgum eru tær beru gitingar ella verulig fakta er ilt at skilja ímillum og fáa nakra sum helst vissu fyri. Men nakað av tí, sum Sosialurin hevur frætt frá keldum, kundi bent á, at ENI hevur rakt við gass í síni boring, og sum skilst verður hetta kannað í løtuni. Men søgurnar siga kortini einki um, hvørt hetta er í rakstrarverdugum nøgdum ella ikki, hvussu góðskan er osfr. Tí ber als ikki til at siga í løtuni, um nakað fund er gjørt á føroyska landgrunninum út frá verandi upplýsingum. Tað er nevniliga ikki óvanligt heldur at raka við smærri nøgdir av gassi, tá borað verður í undirgrundini.

### Í basaltinum

Hinvegin kann gass tíðliga ella miðskeiðis í eini boring eisini geva ábendingar um, at olja møguliga er undir ella longur niðri. Onkur kelda við vera við, at borað er gjøgnum basaltfláir, men at tað eisini er óvíst, um fleiri slíkar eru longur niðri.

Hyggja vit eftir fundinum hjá Chevron hinumegin markið á Rosebank/Lochnagar leiðini ikki so langt frá, har borað verður í Føroyum í løtuni, so vórðu kolvetni heldur óvæntað funnin í basaltløgunum.

Spurningurin, sum tí er relevantur og náttúrligur at seta í sambandi við ENI brunnin á føroyska landgrunninum, er, um tað kann hugsast, at gass og møguliga eisini olja eru í basaltløgunum.

### Jarðfrøðin líkist

Stjórin í ENI vísti á Oljutinginum herfyri á ta sannroynd, at kolvetni eru funnin á Rosebankleiðini, ikki so langt frá økinum, har West Phoenix nú borar og vónaði harvið, at hetta eisini fór at henda føroysku megin markið. Eisini varð víst á, at jarðfrøðin í hesum økinum tykist vera rættiliga eins.

Hann upplýsti eisini, at tað eru ikki færri enn seks mál í ENI boringini, og tá borast skal í umleið ein mánað aftrat mugu vit rokna við, at West Phoenix boripallurin enn ikki hevur rakt við hesi ella flestu av hesum málum. Tá stingur spurningurin seg upp, um gass longu í basaltfláum er komið ávart á borifólkini og kanska tikið tey á bóli. Men tað er framvegis "early days" í boringini, eisini tá hædd verður tikin fyri, at tað als ikki varð borað í knappan mánað vegna ábøtur á trygdarventilin.

### Ongar viðmerkingar

Sosialurin hevur vent sær til Jarðfeingi við hesum spurningum. Petur Joensen, stjóri hevur tó onga viðmerking. ENI hevur sum vera man heldur onga viðmerking. Stjórin har hevur eisini fyrr sagt frá, at teir koma ikki út við nøkrum upplýsingum fyrr enn boringin er liðug og tey hava eftirmett alt tilfarið. Boringin er sum skilst sett til at enda seinast í oktober.

*jan@sosialurin.fo*

# Djúpa vatnið ikki vandasjógvur

**BORING** Kanningar hjá BP vísa, at djúpa vatnið ikki var orsøkin til óhappið í Meksikoflógvanum staðfestir Jarðfeingi

Jan Müller

– Tey, sum hava lisið frágreiðingina hjá BP um óhappið í Meksikanska flógvanum, síggja nú, at tað er ikki tað djúpa vatnið, sum hevur verið orsøkin til ta vanlukkuna, og tí gevur frágreiðingin ikki nakrar ábendingar um, at tað er vandi á ferð at bora á djúpum vatni við Føroyar.

Hetta sigur Meinhard Eliassen, serfrøðingur í trygdarmálum á Jarðfeingi. Hann vísir eisini til, at eftir BP vanlukkuna er oljuídnaðurin farin at endurskoða sínar trygdarskipanir. Eitt nú hevur oljufelagið ENI, sum stendur fyri boringini við Føroyar, modifiserað og útbygt sínar trygdarskipanir umborð á boriskipinum West Phoenix í sambandi við trygdarventilin (BOP, red). Hetta er tann trygdarventilurin, sum skal forða olju og gassi bráddliga at koma upp úr boriholinum og harvið elva til dálking. Teir hava við hesum fylgt tilráðingunum, sum komu tíðliga í vár um at kanna BOP ventilarnar, hvussu væl teir virka, tá tað kemur til stykkis.

Meinhard Eliassen sigur, at ENI í Føroyum við sínum broytingum hevur hækkað hydrauliska trýstið, sum aktiverar ventilarnar, fyri at vera vís í, at teir klára at klippa ein og hvønn part av einum boristrongi. Hann er annars vísir í, at tær tillagingar, sum ENI longu hevur gjørt í Føroyum og sum gjørdu, at boringin mátti steðga í meira enn tríggjar vikur, helst eisini fara at verða settar í verk umborð á øðrum boripallum um stutta tíð.

Boringin á landgrunninum heldur tí fram uttan at føroysku oljumyndugleikarnir hava ampa av útsøgnunum hjá eitt nú Greenpeace.

*jan@sosialurin.fo*



*Meinhard Eliassen á Jarðfeingi er ikki so bangin sum Greenpeace fyri óhappi í sambandi við boring á djúpum vatni*

Mynd Jan Müller